*Framhald av síðu 13*

hava eittans samferðslukervi í landinum, sum fevnir um bæði lands- og sjóvegirnar.

- Kostnaðurin fyri flutning um og undir firðir og sund má lækka - og tað kann hann bert, um fleiri eru um at gjalda, sigur hann, og mælir hann tí til, at løgtingið viðurkennur, at sjóvegirnir ímillum ferjulegurnar fær somu støðu í vegakervi okkara, sum landsvegirnir hava.

- Eg meti tað verða alneyðugt, at løgtingið sum skjótast ger nakað við hendan stóra trupulleika, sum fólk í útjaðaranum hava.

- Eg fari tí at mæla løgtinginum til at endurskoða okkara samferðsluviðurskifti, tí galdandi skipan er ikki rættvís og harafturat til stóran bága fyri útjaðaran.

- Meina vit nakað við tað, tá ið vit siga, at Føroyar eru einar Føroyar fyri allar føroyingar, so taka vit henda eykaskattin av, sum er lagdur á fólk í útjaðaranum, og ístaðin gera vit eina skipan, soleiðis at alt vegakervið - tað til lands eins væl og tað til sjós - verður skipað eftir samhaldsføstum meginreglum.

- Tí hesin eykaskattur er við til at kvala útjaðaran spakuliga, men ósvitaliga, sigur Marjus Dam.



*– Tað er hesari og undanfarnu samgongu til heiðurs, at tær av álvara hava tikið økismenningarmálið upp til kanningar og viðgerðar, men tað hevur yvirhøvur gingið alt ov striltið at fáa gongd á tiltøk, sum eru neyðug at seta í verk til frama fyri útoyggjarnar og tey størru økini í landinum.*
*– Tað er rætt av føroyingum at standa saman um eina skipan á samferðsluøkinum, sum er fyri alt landið, heldur enn at hava serskipanir fyri hvørt øki sær, sigur Marjus Dam, løgtingsmaður*

### Góðar vónir

Uppskotið hjá Marjusi Dam um at fáa gjørt eina samhaldsfasta samferðsluskipan fyri alt landið verður lagt fram, so skjótt løgtingið kemur saman í komandi ári, væntandi miðskeiðis í januar mánaði.

Hann væntar sær góða undirtøku frá tingmonnum úr øllum flokkum.

Hann sigur, at tað er hesari og undanfarnu samgongu til heiðurs, at tær av álvara hava tikið økismenningarmálið upp til kanningar og viðgerðar, men hann metir, at tað yvirhøvur hevur gingið alt ov striltið at fáa gongd á tiltøk, sum eru neyðug at seta í verk til frama fyri útoyggjarnar og tey størru økini í landinum.

- Tað er rætt av føroyingum at standa saman um eina skipan á samferðsluøkinum, sum er fyri alt landið, heldur enn at hava serskipanir fyri hvørt øki sær, sigur Marjus Dam.

Hvørja lagnu uppskotið hjá Marjusi Dam fer at fáa í løgtinginum, er ilt at meta um, men farleiðirnar fara tó framhaldandi at føra báðar vegir, bæði aftur og fram - og miðstaðarøkið fer framhaldandi at hava tørv á teimum eins væl og útjaðarin.

## Friðarhøvdingin

Fragdarljómur ljóðar hátt
bjarta himnaljósið
friðarhøvdingin á nátt
føddur varð í fjósi

í einsemi á berajól
í myrkri,angist,ótta
dýrdarglæman - verndarskjól
sær jólasól á alra flótta

væni einglaherur hátt
yvir víðum fløtum
ljóða gleðiboð á gátt
fríðum alfaragøtum

himnaljómur- einglalag
hátt av himni ljóðar
til himna fagra friðarstað
fjónaðu fjøld innbjóðar

margar bústaðir til tann
kúgaður og píndur her
himnakrúnuna svá vann
sigursæl á himnaferð

latum fagnaðarljómin ljóða
friðarhøvdingin á ferð
heim í himnasalar bjóða
frælsisboð um verøld ber

**Sólmundur Joensen**
**des.- 02**






**UTTAN ÚR HEIMI**

# Skunda sær at gera kjarnorkuvápn

**Amerikanska hóttanin um at leypa á Irak ger, at onnur lond leggja størri dent á at útvega sær kjarnorkuvápn**

KJARNORKUVÁPN
*Árni Joensen*

Tað vakti stóran altjóðaans, tá norðurkoreanar fyri nøkrum døgum síðani boðaðu frá, at teir hava tikið sína kjarnorkuverkætlan uppaftur. Altjóða kjarnorkustovnurin í Wien sigur seg stúra fyri norðurkoreansku avgerðini. Tað sama siga amerikanarar og bretar.

Stjórin á norska friðargranskingarstovninum, Stein Tønnesson, heldur, at amerikanska hóttanin um at leypa á Irak ger, at onnur lond kvika sær at fáa sær kjarnorkuvápn ella látast, sum at tey londu hava slík vápn.

- Hetta er galdandi fyri eitt nú Iran, sum leingi hevur samstarvað við Russland um kjarnorku, sum møguliga kann nýtast til at gera kjarnorkuvápn. Tað er eisini galdandi fyri Norðurkorea, sigur Stein Tønnesson. Sjálvur heldur hann ikki, at Norðurkorea er komið so langt við sínum ætlanum, sum landið vil vera við.

Hinvegin ásannar hann, at gongdin teir seinastu dagarnar økir vandan fyri einum amerikanskum álopi á Norðurkorea. Hann væntar ikki, at talan verður um beinleiðis kríggj, men heldur um eitt bumbu- ella rakettálop á norðurkoreansku kjarnorkustøðirnar. Í 1994 umhugsaði Bill Clinton, forseti eitt tílíkt álop, men tá eudnaðist tað at finna eina diplomatiska loysn.

# Vann 2,3 mia. í lotto

**Tann 55 ára gamli amerikanarin Andrew Jack Whittaker vann einsamallur allan høvuðsvinningin í Powerball-lottospælinum á jólum.**

LOTTOSPÆL
*Árni Joensen*




*Tann hepni vinnarin saman við konu og dóttur síni*

*Mynd: Reuters*

Andrew Jack Whittaker, sum býr í tí lítla býnum Hurricane í statinum West Virginia, fekk ársins jólagávu, tá hann við tølunum 5, 14, 16, 29 og 53 og eykatalinum 7 vann allan høvuðsvinningin í Powerball-lottospælinum. Og tað var ikki eiti á vinningur - 314,9 milliónir dollarar ella góðar 2,3 milliardir krónur.

Tann hepni vinnarin sigur, at hann fer at geva kirkjuni ein part av vinninginum, familjan fær ein part, og nakað ætlar hann at nýta til fyritøku sína, sum fæst við ymiskt byggivirksemi.

Andrew Jack Whittaker kann velja ímillum at fáa 170 milliónir dollarar útgoldnar í einum ella allar teir 315 milliónir dollararnar í føstum gjøldum tey næstu 29 árini. Men hann hevur longu boðað frá, at hann vil hava peningin útgoldnan í einum.

# "Prestige" lekur enn

**Hvønn dag renna umleið 150 tons av olju úr tangunum á "Prestige"**

Fimm vikur eru nú lidnar, síðani oljutanmgaskipið "Prestige" brotnaði av um tvøran og sakk úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini, og framvegis rennur olja úr tangunum. Tað ger, at myndugleikarnir í Spania vænta, at umhvørvisvanlukkan verður uppaftur størri enn upprunaliga mett.

Myndir hjá einum fronskum kavbáti hava avdúkað seks rivur í skrokkinum á tí sokna skipinum, og hildið verður, at eini 150 tons av olju leka úr skipinum um dagin. Tá "Prestige" sakk, vóru framvegis umleið 55.000 tons av olju í tangunum, og rennur øll oljan úr skipinum, kann tað fara at taka fleiri ár at rudda tær dálkaðu strendurnar aftur.

Nógv olja rekur á havleiðunum norðan fyri Spania, og myndugleikarnir í Fraklandi bera ótta fyri, at oljan kann reka upp á land har.

Samstundis royna sponsku myndugleikarnir at finna ein hátt at steðga oljulekanum, men altjóða serfrøðingar viðganga, at teir hava onga loysn funnið enn.

## Ávara um borgarakríggj

Andstøðan í Venesuela ávarar nú um, at vandi er fyri borgarakríggi, slakar Hugo Chavez, forseti ikki fyri kravinum um nýval.

Aðalverkfall hevur nú verið í Venesuela í næstan fýra vikur. Tað hevur lagt landið lamið og hevur m. a. steðgað tí týdningarmikla oljuútflutninginum, sum er grundarsteinurin undir landsins búskapi. Úrslitið er, Venesuela nú noyðist at innflyta olju.

Hugo Chavez, forseti hevur higartil sýtt fyri at gera eftir kravinum um nýval, samstundis sum andstøðan og fakfeløgini halda fram við at finnast at honum og politikki hansara. Andstøðan vil vera við, at politikkurin hjá forsetanum hevur oyðilagt landsins búskap.

## Labour minni undirtøku

Ein meiningakanning hjá bretska blaðnum The Financial Times vísir, at bretar hava ikki serliga gott álit á búskaparpolitikkinum hjá Blair-stjórnini.

44 prosent av teimum spurdu siga, at stjórnin rekur ikki tann rætta búskaparpolitikkin, og at politikkurin er ov stuttskygdur. 38 prosent halda, at búskaparpolitikkurin er í lagi, og so líla undirtøku hevur búskaparpolitikkurin hjá stjórnini ikki havt, síðani hetta stjórnarskeiðið byrjaði.

Tann sama kanningin vísir eisini, at bara 43 prosent av veljarunum styðja stjórnina hjá Tony Blair. Fyri einum ári síðani søgdu 51 prosent, at tey styðjaðu stjórnina. Tony Blair sjálvur er heldur ikki so høgt í metum longur. Bara 38 prosent av teimum spurdu siga seg vera nøgd við forsætisráðharran.

## Meiriluti fyri Svøríki sum lýðveldi

Hevði svenski Ríkisdagurin havt heimild til at taka kongsveldið av, hevði hann kanska gjørt tað.

Í hvussu er vísir ein kanning hjá Svenska Dagbladet, at meirilutin av tinglimunum eru fyri at taka kongsveldið av og at skipa Svøríki sum eitt lýðveldi. Av teimum 349 tinglimunum siga 163, at teir vilja varðveita kongsveldið, 167 siga, at teir eru fyri at skipa landið sum lýðveldi, sjey svaraðu ikki spurninginum, og tólv hava ikki tikið støðu.

Kanningin hjá Svenska Dagbladet vísir, at tey, sum eru fyri lýðveldi, umboða allar flokkarnar í Ríkisdegnum. Flestu lýðveldisfólkini eru kortini í Sosialdemokratiska flokkinum, Umhvørvisflokkinum og Vinstraflokkinum.

## Nógv ecstasy

Løgreglan í Avstralia kom jólaaftan fram á 750.000 ecstasy-tablettir, sum lógu fjaldar í einum vøruvogni, sum løgreglan steðgaði nakað sunnan fyri Sidney. Sambært løgregluni eru tablettirnar 183 milliónir krónur verdar á ólógliga rúsevnismarknaðinum.

Avstralska løgreglan sigur, at hon hevur tikið tríggjar menn, sum verða hildnir at vera í leiðsluni í einum rúsevnisfelagsskapi. Ein av teimum trimum tiknu monnunum er kanadiumaður. Løgreglan sigur, at hon hevur leitað eftir monnunum leingi, og at hon m. a. hevur samstarvað við niðurlendsku løgregluna í kanningararbeiðinum.

Ecstasy er vanligt á diskotekum í avstralskum stórbýum og serliga í Sidney. Á nýggjárinum fara nógvir avstralskir ungdómar í diskotek, og tí hevur løgreglan styrkt vaktarhaldið við fleiri av teimum best vitjaðu diskotekunum.